# á Árnafirði





*Eitt nýtt kapitul er byrjað í føroyskari alisøgu. Nú verður toskur aldur á Árnafirði – og í næstum verður eisini farið undir toskaaling í kørum í Hvalba*

*Mynd: Høgni Thomsen*



*Í síðstu viku vórðu 50.000 toskayngul sett út – og í morgun komu 14.000 yngul út aftrat*

*Mynd: Høgni Thomsen*

svimja í ringum á Árnafirði og restin av ynglinum, sum Fiskaaling hevur svimjandi, fer so suður til Hvalbiar, tá ið teir eru klárir at taka ímóti.

- Allur yngulin, sum fer norður til Árnafjarðar, er yngul undan toski av Føroyabanka, meðan umleið 10.000 av teimum 40.000, sum skulu til Hvalbiar, er undan toski á landgrunninum. Hini 30.000 eru undan toski á Føroyabanka.

Poul sigur, at Fiskaaling fekk lívfiskin, sum yngulin er undan, fyri jól í fjør. Talan er um 40 toskar, og fyri umleið einum mánaða síðan fekk stovnurin einar 60 toskar aftrat.

## Gongdin til yngul

Tað er havrannsóknarskipið Magnus Heinason, sum letur Fiskaaling lívfiskin.

- Toskurin av Føroyabanka gýtir umleið ein mánaða seinni enn toskurin á landgrunninum annars. Tá rognini eru fingin frá umleið hálvum apríl og mánaðan út, verða tey løgd í klekjaríið. Í byrjanini verður tað, sum kemur undan, startfóðrað.

Poul sigur, at tá ið startfóðringin er liðug, verður fiskurin sorteraður um mánaðarskiftið juni/juli.

- Vit hava smoltið, sum tá vigar umleið 0,2 gram, í stórum posum í staðin fyri í kørum, tí hetta er bíligari. Posarnir liggja í anlegginum á sjónum og hvør posi, sum er einar 100 rúmmetrar stórur, kann hava uppí einar 80.000 fiskar svimjandi.

Hann sigur, at eitt ávíst felli er frá tí, at klekingin er farin fram, til fiskurin kann latast alarum, og ein partur verður eisini skildur frá.

## Ógvuliga spennandi

Ein norðmaður, sum hevur drúgvar royndir innan aling, eisini við toski og kalva, hevur hjálpt Fiskaaling við ætlanini.

Poul sigur, at tað hevur havt stóran týdning fyri verkætlanina, at norðmaðurin, sum nú hevur verið í Føroyum í eitt ár, hevur verið og framvegis er við.

- Nú fiskur er settur út, eru vit ógvuliga spentir eftir at vita, hvussu fer at gangast. Vit halda, at báðar royndirnar, sum nú eru og fara í gongd, eru líka spennandi – á hvør sín hátt.

Hann heldur, at alingin, sum skjótt fer í gongd í kørum uppi á landi í Hvalba, hevur sínar fyrimunir, um hon eydnast.

- Her fer at bera væl til at stýra eitt nú hita og ljósi, sum hava stóran týdning fyri vøkstur og kynsbúning. Annars eru vit í tí hepnu støðu í Føroyum, at sjóvarhitin er rættiliga støðugur og væl egnaður til aling.

## Nógvir spurningar

Poul Vestergaard sigur, at hóast komið nú er har til, at fiskur er settur út, eru nógvir spurningar, sum arbeiðast má við.

- Vit vita, at toskurin á Føroyabanka veksur ógvuliga væl í sínum egna umhvørvi, men vit vita ikki, hvussu hann veksur og trívist í búri.

Hann vísir á, at eitt, sum hevur verið ein trupulleiki í aling av toski, er kynsbúningin, sum higartil ikki hevur eydnast at útskjóta eins væl og við laksinum.

- Men her gongur eisini framá, leggur hann aftrat.

Tað er serliga ljósið og ljósstyrkin, sum brúkt verða í útskjótingini av kynsbúningini av alifiski.

- Vit vænta, at aldi toskurin fer at viga eini 4-5 kilo, tá ið hann verður tikin til sláturs, sigur Poul Vestergaard á Fiskaaling at enda.